# ítróttur

Nr. 5 • mikudagur • 9. januar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

VÍF-venjarin:

## Neistin er favorittur

**Venjarin hjá besta mansliðnum hjá VÍF, Páll Poulsen metir, at Neistin er favorittur at vinna oddadystin í Vestmanna mikukvøldið. Orsøkin til hesa meting er, at Neistin er væl koyrandi í løtuni, meðan VÍF ikki hevur verið serliga sannførandi seinastu dystirnar**

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Mikukvøldið klokkan 20 verður seinasti dysturin í grundspælinum í 1. deild hjá monnum spældur. Hann verður millum VÍF og Neistan í høllini í Vestmanna. Hetta er ein útsettur dystur, sum upprunaliga skuldi spælast í desember.

Páll Poulsen, venjari hjá VÍF, heldur ikki, at hesin dysturin fer at hava altavgerandi týdning fyri meistaraheitið. Hetta er ein dystur í grundspælinum og fer tí bara at telja eitt stig tá avtornar. Tó viðgongur hann, at hesin væl kann gerast tungan á vágskálini, tá kappingarárið er at enda komið.

### Neistin favorittur

Hóast VÍF hevur fyrimunin av heimavølli fer Páll Poulsen ikki at útnevna sítt lið til favoritt at vinna dystin.

– Um hugt verður at dagsforminum og tveimum teimum seinastu dystunum, so má Neistin vera favorittur, tí teir eru væl koyrandi í løtuni, sigur Páll Poulsen.

Hann leggur afturat, at dysturin kann fáa stóran sálarligan týdning fyri kappingina víðari.

– Neistin hevur vant nógv í jólafrítíðini, meðan okkara leikarar als ikki hava vant. Tí hevði tað verið ein dyggari sálarligur smeitur fyri Neistan, um teir tapa, enn fyri okkum, sigur venjarin.

– Vit hava lagt tað soleiðis til rættis, at vit vandu ógvuliga nógv í byrjanini av kappingini og vóru eisini á venjingarlegu tá. Tí hava leikararnir fingið ein steðg nú á jólum, og ætlanin er, at teir síðani skulu vera í sínum besta formi móti endanum av kappingini, sigur Páll Poulsen.



*Seinast liðini hittust, endaði tað við javnleiki 24-24. Páll Poulsen vil hinvegin vera við, at Neistin er favorittur hesuferð, tí teir hava sýnt betri spæl seinastu dystirnar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Johnny ivasamur

Venjarin væntar at hava at kalla allar spælarar tøkar til dystin mikukvøldið. Tó er Johnny Joensen sera ivasamur. Hann var so óheppin at detta á arbeiðsplássinum, og hann hevur ligið á sjúkrahúsinum seinastu dagarnar.

Sámal Joensen hevur eisini drigist við onkran smáskaða, og tí er ikki heilt vist, um tann fjallhøgi leikarin verður klárur til dystin.

Annars sigur venjarin, at leikararnir hava eina ógvuliga tætta skrá komandi vikurnar. Tey liðini, ið framvegis eru við í steypakappingini, spæla at kalla tveir dystir um vikuna, og avleiðingin er, at venjingin ikki verður eins góð, og hon skuldi, heldur venjarin.

## Málverjar fara at avgera dystin

**Dia Midjord, venjarin hjá Neistanum, væntar, at málverjarnir fara at hava ein ógvuliga týðandi leiklut í dystinum móti VÍF mikukvøldið. Tó vil hann ikki útnevna nakran favoritt undan dystinum. Neistin hevur allar menn tøkar**

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Venjarin hjá Neistanum heldur eins og venjarin hjá VÍF ikki, at hesin dysturin fer at hava altavgerandi týdning. Hann metir, at bæði liðini kunnu loyva sær at tapa dystin uttan at missa møguleikan fyri at vinna meistaraheitið. Tó leggur hann dent á, at Neistin fer til Vestmanna fyri at vinna dystin.

Hann væntar harumframt at hava allar menn tøkar. Eingin er skaddur, men Áki Mørk hevur ligið sjúkur í nakrar dagar. Tó verður hann við í Vestmanna.

– Eg haldi tó, at eg kann lova áskoðarunum ein tættan og spennandi dyst í høllini í Vestmanna, sigur Dia Midjord.

### Málmenn avgera

Í tøttum og spennandi dystum hava málmenn ofta meira týðandi leiklut enn til aðrar, har munurin er størri. Dia væntar, at málmenninir fara at avgera oddadystin millum VÍF og Neistan.

– Málmenninir fara at hava stóran týdning í hesum dystinum, tí hann verður væntandi sera javnur. Um annar málverjin tekur fleiri skot, tá leikarar eru leysir, so kann hann vinna dystin fyri sítt lið, sigur Dia Midjord.



*Dia Midjord, venjari hjá Neistanum, væntar ein tættan og spennandi dyst mikukvøldið móti VÍF. Hann væntar, at málverjarnir fáa týðandi leiklutir*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hann heldur, at bæði VÍF og Neistin hava ógvuliga sterkar málverjar. Hjá VÍF eru Eli Müller og Bárður Nielsen, og Neistin hevur íslendingin Petur Magnusson og jugoslavan Zeljko Jotic at verja málið.

– Vit hava tveir góðar málverjar, men eg vænti, at Zeljko verður við frá byrjan móti VÍF. Hann hevur staðið ómetaliga væl í málinum seinastu dystirnar, og tí velji eg hann framum hesuferð. Tó er altíð møguleiki at skifta, sigur Dia Midjord.

### Neistin betur fyri

Dia dylur ikki fyri, at Neistin hevur verið meira sannførandi enn VÍF seinastu dystirnar. Neistin hevur vunnið 47-31 á KÍF og 38-24 á H71 í teimum seinastu tveimum umførunum. VÍF spældi hinvegin javnt 20-20 móti H71 og vann tepurt við trimum málum móti Tjaldri.

Dia sigur, at Neistin hevur staðið seg væl í Vestmanna seinastu árini, og tí kann eingin útnevnast sum favorittur at vinna.

Hann sigur, at VÍF hevur havt trupulleikar í verjuni, ið ikki hevur riggað, sum hon skal. Hetta sást millum annað í dystinum móti H71.

Kanska er hetta lykla-orðið, um Neistin skal gera sær vónir um at vinna.

Hann sigur í sama viðfangi, at VÍF spælir ómetaliga góðan álopshondbólt, har tað gongur skjótt frameftir vøllinum.

### Stigatalvan

**Støðan hjá monnunum í grundspælinum**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 11 | 9 - 2 - 0 | 322 | 260 | 62 | 20 |
| 2 | Neistin | 11 | 9 - 2 - 0 | 354 | 292 | 62 | 20 |
| 3 | H71 | 12 | 5 - 2 - 5 | 329 | 334 | -5 | 12 |
| 4 | StÍF | 12 | 5 - 1 - 6 | 326 | 315 | 11 | 11 |
| 5 | Tjaldur | 12 | 3 - 2 - 7 | 290 | 332 | -42 | 8 |
| 6 | KÍF | 12 | 3 - 1 - 8 | 314 | 354 | -40 | 7 |
| 7 | Kyndil | 12 | 2 - 0 -10 | 274 | 322 | -48 | 4 |



# Hans Kristian ársins telvari 2001

**Henda heiðurin átti 18 ára gamli kollfirðingurin Hans Kristian Simonsen uttan iva. Frá byrjan til endan av árinum hevði hann bert góð úrslit at vísa á, og nýggja talvár hansara hevur somuleiðis fingið eina góða byrjan**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Árið 2001 varð eitt sera hendingarríkt føroyskt talvár. Í vetur endaði liðkappingin 2000/2001 við Havnar Telvingarfelag sum føroyameistara, og eisini fingu unglingar okkara góð úrslit í Norðurlandameistaraheitinum. Havnar Telvingarfelag skipaði fyri einari rataðari várkapping, og hesa vann Olaf Berg í serklassa. Á páskum John Rødgaard føroyameistari í FM-einstaklingakappingini í harðari kapping við Eyðun Nolsøe. Olaf Berg vann almenna bólkin, har Terji Petersen gav honum kapping til síðsta talv. Hans Kristian Simonsen vann unglingabólkin, meðan Petur Højgaard vann veteranbólkin. FM varð telvað í Vestmanna, og varð tað ein sera væleydnað FM-kapping, har vestmenningar bæði dugdu fyrimyndarliga væl at fyrireika kappingina, samstundis sum blíðskapurin var í hásæti.

### Heimsins besti í Føroyum

Stórhendingin í farna árinum varð sjálvsagt í juni mánaða tá heimsins besti telvari Garry Kasparov vitjaði Føroyar í fýra dagar.

Vitjanin kom í lag eftir drúgvt og væl fyrireikaðum arbeiði frá Talvsambandi Føroyum. Stutt sagt ein ótrúlig hending, serliga fyri talváhugaði í Føroyum, men eisini fyri føroyingar yvirhøvur eftirsum øll kenna heimskenda navnið. Kasparov telvaði simultantelving í Klaksvík, og vann 24-1 har áður nevndi Hans Kristian Simonsen sensationelt vann á talvkonginum. Talvið og tíðindini um úrslit Hans Kristians fór víða um allan heimin. Síðani vann Kasparov 5-1 á landsliðnum í simultantelving í Norðurlandahúsinum. John Arni Nilssen og Heini Olsen megnaðu óvæntað at leika javnleik. Sjálvur segði Kasparov seg vera væl móttiknan í Føroyum og fór av landinum sum ein fegin maður.

Í summar varð FM í snartalvi leikt í Havnini, og vinnari bleiv IM John Rødgaard meðan Jóan Hendrik Andreasen og Flóvin Tór Næs endaðu næstfremstir í vælmannaðu og sterku snarkappingini. Í August vitjaðu íslendingar frá norður- og eysturlandinum. Føroyan vunnu hendan landsdyst við heili 14,5-5,5. John Arni Nilssen luttók í august mánaða í NM við góðum úrslitum.



*Stórhendingin á árinum var uttan iva, tá Gary Kasparov í juni mánaði kom á vitjan í Føroym*

### Heystið

Ólavur Simonsen vann árligu Íslandssúlukappingina framanfyri Hans Kristian í september. Vestmenningar skipaðu fyri jubileumskapping somuleiðis í september, tá teir í fjør høvdu 50 ára stovningsdag. Klaksvíkingar vunnu hesa vælmannaðu liðkapping.

FM-Liðkappingin byrjaði í oktober, og eftir at komin er í helvt eru klaksvíkingar fremstir við havnarmonnum og vestmenningum í hølunum. 6. Umfar verður komandi leygardag. Í oktober umboðaði Hans Kristian Føroyar í HM kappingini fyri ungdómar. Hann fekk eitt megnarúrslit, sum viðførdi eitt altjóða ratingtal áljóðandi 2234, samstundis sum føroyska talið fekk eitt stórt lop.

Havnar Telvingarfelag skipaði fyri HT-open í november, og vinnarar blivu Olaf Berg og Ólavur Simonsen. Martin Poulsen, Herluf Hansen og Hans Kristian vóru eisini væl við í toppstríðnum.

Aktiviteturin í føroyum varð tískil rúgvismikil í 2001. Talvútisetarnir í Keypmannahavn vóru somuleiðis sera aktivir í farna árinum. Í donsku 2. deild liggja teir trifremstir nú kappingin er komin í helvt. Útisetar okkara eru oftani í kapping á flatlondum, har nógvar eru at velja ímlillum.

2002 er talvolympiadu ár. OL verður í Slovenia komandi heyst. Telvarar plaga at stríðast eyka nógv tá Olympiada er, við vón um at blíva úttiknir, og tí kann bert væntast at aktiviteturin í hesum árinum ikki verður minni enn í fjør.

### Hans Kristian og Martin í Svøriki

Rilton Cup er kend kapping. Telvarar víða um luttaka í hesari siðvandu kapping og harímillum onkuntíð eisini føroyingar. Kappingin varð í døgunum 27. des — 05. jan.

Hans Kristian fekk eitt gott úrslit við sínum hálvum fimta stigi av níggju møguligum, meðan Martin Poulsen hevði eina minni góða kapping við hálvum fjórða stigi. Hans Kristian vinnur sær nøkur ratingstig, meðan Martin helst missur nøkur fá. Vinnari bleiv sviin GM Agrest.

Hans Kristian er sum sagt ársins telvari 2001. Framgongdin tykist í løtuni ongan enda at taka, og heldur hann fram á sama hátt er Olympiadu-luttøka ikki ógjørlig. Aðrir telvarar sum høvdu eitt framúr gott talvvár í fjør, vóru eitt nú unglingarnir Olaf Berg og Rúni Dragaberg. Eyðun Nolsøe, Finnbjørn Vang (nr. 2 í FM í útisetu saman við Heina Olsen, aftanfyri vinnaran Terja Petersen), Jóan H. Andreasen og undirritaði høvdu somuleiðis góða framgongd at vísa á.

Í Keypmannahavn royndi Heini Olsen seg í Øbro Nytår, og væl gekst í hond hjá klaksvíkinginum. Eftir eina heldur slaka byrjan reistist hann og vann síni seinastu trý talv og gav hetta honum eitt pent annað pláss við hálvum sætta stigi av sjey møguligum. Vinnari bleiv Esben Lund. Heini tykist at hava vent talvligu afturgongdini.



*Einasti føroyski telvarin, sum fekk kongin at leggja kongin, var Hans Kristian Simonsen úr Kollafirði, og yvir høvur gjørdist 2001 eitt sera gott ár hjá unga kollfirðinginum*

### Styrkislistar

**Føroyski ratinglistin 1. januar 2002**
(Toppurin)

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | John Arni Nilssen | HT | 2360 |
| 2 | John Rødgaard, IM | VT | 2315 |
| 3 | Heini Olsen | KTF | 2240 |
| 4 | Flóvin þór Næs | HT | 2235 |
| 5 | Eyðun Nolsøe | KTF | 2220 |
| 6 | Ólavur Simonsen | KTF | 2215 |
| 7 | Torbjørn Thomsen | KT | 2210 |
| 8 | Rani Nolsøe | KTF | 2185 |
| 9 | Jens Christian Hansen | TT | 2165 |
| - | Bogi Ziska | TF | 2165 |
| 11 | Rógvi W. Rasmussen | HT | 2155 |
| 12 | Jóan Hendrik Andreasen | HT | 2125 |
| 13 | Carl Eli N. Samuelsen | HT | 2105 |
| - | Terji Petersen | KTF | 2105 |
| 15 | Heini Danielsen | HT | 2095 |
| 16 | Martin Poulsen | HT | 2090 |
| - | Steintór Rasmussen | KTF | 2090 |
| 18 | Torkil Nielsen | ST | 2080 |
| 19 | Hans Kristian Simonsen | KT | 2070 |
| 20 | Martin Brekká | TFS | 2060 |
| 21 | Olaf Berg | HT | 2055 |
| 22 | Finnbjørn Zachariasen | TFS | 2050 |
| 23 | Herluf Hansen | HT | 2035 |
| 24 | Bernhard Thomsen | KT | 1980 |
| 25 | Wille Olsen | KTF | 1975 |
| 26 | Finnbjørn Vang | KTF | 1965 |
| - | Haldur Suni Johansen | HT | 1965 |
| - | Tummas M. Anthoniussen | KTF | 1965 |

**Altjóða ratinglistin 1. januar 2002**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Gary Kasparov | (Russland) | 2838 |
| 2 | Vladimir Kramnik | (Russland) | 2809 |
| 3 | Viswanathan Anand | (India) | 2757 |
| 4 | Alexander Morozevich | (Russland) | 2742 |
| 5 | Michael Adams | (England) | 2742 |
| 6 | Veselin Topalov | (Bulgaria) | 2739 |
| 7 | Ruslan Ponomariov | (Ukreina) | 2727 |
| 8 | Vasily Ivanchuk | (Ukreina) | 2717 |
| 9 | Alxey Shirov | (Spania) | 2715 |
| 10 | Peter Leko | (Ungarn) | 2713 |

**Føroyingar á altjóða ratinglistanum:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | John Rødgaard | 2365 |
| 2 | John Arni Nilssen | 2357 |
| 3 | Heini Olsen | 2256 |
| 4 | Jens Chr. Hansen | 2235 |
| 5-6 | Hans Kr. Simonsen | 2234 |
| 5-6 | Eyðun Nolsøe | 2234 |
| 7 | Flóvin Tór Næs | 2232 |
| 8 | Torbjørn Thomsen | 2212 |
| 9 | Bogi Ziska | 2205 |
| 10 | Ólavur Simonsen | 2202 |
| 11 | Rani Nolsøe | 2169 |
| 12 | Carl Eli N. Samuelsen | 2155 |
| 13 | Rógvi W. Rasmussen | 2149 |
| 14 | Heini Danielsen | 2133 |
| 15 | Terji Petersen | 2128 |
| 16 | Steintór Rasmussen | 2121 |
| 17 | Jóan H. Andreasen | 2111 |
| 18 | Martin Brekká | 2105 |
| 19 | Martin Poulsen | 2101 |
| 20 | Herluf Hansen | 2067 |
| 21 | Olaf Berg | 2049 |